## Nýtt á Egilsstøðum

Síðani 2003 hevur verið arbeitt við at gera nýggja komuhøll á flogvøllinum á Egilsstøðum í Íslandi, tí útlit vóru til fleiri ferðafólk. Hetta hevur eisini verið so. Í 2003 komu og fóru 85.000 fólk um vøllin, og í fjør var talið 157.000. Um vikuskiftið varð so tann nýggja komuhøllin tikin í nýtslu. Nýggi bygningurin gevur ferðafólkunum góðar 300 fermetrar afturat, so nú eru ferðafólkahølini á Egilsstøðum umleið 1200 fermetrar, skrivar Morgunblaðið.



*Flogvøllurin á Egilsstøðum er ein av teimum stóru í Íslandi*

*Savnsmynd*

## Reklamufelagið havt aðalfund

Gunvá við Keldu er nýggjur nevndarlimur í Reklamufelagnum. Fríggjadagin hevði felagið aðalfund. Í nevndini tað seinasta árið hava sitið Petur Mohr Reinert, formaður, Allan Dalsgarð, næstformaður og Ingi Joensen. Ingi Joensen stóð fyri vali og tók ikki við afturvali. Í hansara stað varð Gunvá við Keldu vald í nevndina. Nevndin hevur ikki skipað seg enn. Reklamufelagið er vinnufelag fyri allar fyritøkur í Føroyum, sum fáast við at gera reklamu og marknaðarføring.

# Vitan fær okkum at síggja tað ósjónliga

**- Skulu Føroyar megna at síggja og nýta teir møguleikar, sum eru í okkara tilfeingi og í alheimsgerðini, er alneyðugt við íløgum í vitan. Tað segði Kristina Háfoss, landsstýriskvinna, tá hon legði lógaruppskotið fyri løgtingið um miðnámsskúladepil í Marknagili**



*- Vit hava sett okkum sum mál at raðfesta íløgur í vitan høgt komandi árini. Hetta er ein fyritreyt fyri allari menning í landinum, sigur Kristina Háfoss, landsstýriskvinna*

SKÚLADEPIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gamalt er, at "blindur er bókleysur maður".

- Men eitt samfelag, ið ikki ger íløgur í vitan, gerst eisini blint – blint fyri at gagnnýta landsins tilfeingi til fulnar, blint fyri at síggja ótroyttar møguleikar – og blint fyri at skapa ta menning og vælferð, ið er møgulig.

Tað segði landsstýriskvinnan í skúlamálum, Kristina Háfoss, tá hon røddi um miðnámsskúladepilin, sum hon í vikuni hevur lagt lógaruppskot fyri tingið um at byggja í Marknagili.

Í vikuni var fyrsta viðgerð av hesum máli, og síðan er uppskotið farið til viðgerðar í mentanarnevnd løgtingsins.

Undir viðgerðini á tingi legði landsstýriskvinnan dent á, at skulu Føroyar megna at síggja og nýta teir møguleikar, sum eru í okkara tilfeingi og í alheimsgerðini, er alneyðugt við íløgum í vitan.

- Tí hava vit sett okkum sum mál at raðfesta íløgur í vitan høgt komandi árini. Hetta er ein fyritreyt fyri allari menning í landinum.

Kristina Háfoss segði, at uppskotið um nýggjan miðnámsskúladepil í Marknagili í nógvar mátar er ein søgulig verkætlan.

- Í fyrsta lagi hevur verkætlanin eina langa søgu; hon hevur leingi verið ávegis, og talan er samstundis um mest umfatandi skúlabygging í Føroya søgu, segði landsstýriskvinnan.

### Dagføring og nútímansgerð

Undir viðgerðini segði Kristina Háfoss, at miðnámsskúlaøkið hevur verið raðfest alt, alt ov lágt seinastu mongu árini.

- Men nú er broyting hend, og tað er at fegnast um, at hesir skúlar nú verða dagførdir og nútímansgjørdir.

Í hesum árinum verða nýggi miðnámsskúlin í Suðuroy og nýggi fiskivinnuskúlin í Vestmanna ætlandi tiknir í nýtslu, samstundis sum útbyggingin av Tekniska skúla í Klaksvík eisini verður liðug í ár.

- Eftir standa miðnámsskúlarnir í Havn, sum allir hava alstóran tørv á nýggjum og meira tíðarhóskandi hølum sum skjótast.

Landsstýriskvinnan segði, at lógaruppskotið, sum skal skapa karmarnar um nýggja miðnámsskúladepilin, ásetir yvirskipaðu karmarnar, tá ræður um fígging og støðd.

Hon segði, at støddarkarmurin er 17.000 fermetrar umframt 1.800 fermetrar, um núverandi handilskúlabygningur eisini verður tikin við.

- Fíggjarkarmurin er 391 miljónir krónur, og haraftrat skulu leggjast útreiðslur til innbúgv og útgerð, segði Kristina.

Landsstýriskvinnan vísti á, at verður upphæddin á 391 miljónir krónur býtt yvir tíðarskeiðið 2008-2013, er talan um 65 miljónir krónur um árið í miðal.

- Men býtið verður øðrvísi, tí lutfalsliga lítið verður brúkt í 2008 og 2009 - og meira tey seinnu árini.

Kristina Háfoss segði, at ikki er møguligt at áseta býtið yvir árini enn, tí sjálv verkætlanin er ikki klár.

# Vanligt at halda innbúgv og KT uttanfyri

**Bill Justinussen verjir lógaruppskotið hjá Kristinu Háfoss um Miðnámsskúladepil í Marknagili, og sigur tað vera vanligt at bíða við játtan til KT og innbúgv**

SKÚLASKAPUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Formaðurin í Mentanarnevndini, Bill Justinussen, tekur ikki atfinningarnar frá samgongu og andstøðu til eftirtektar, eftir at málið um nýggjan miðnámsskúla var til 1.viðgerðar í løgtinginum hósdagin. Tá fanst millum annað Annika Olsen úr Fólkaflokkinum at uppskotinum, tí peningur er ikki settur av til keyp av innbúgv og KT til skúlan. Hon segði seg tí vera púra vísa í, at ein umsókn um eykajáttan fer at koma omaná verandi uppskot.

- Tað er ikki óvanligt at halda KT og slíkt burtur frá tílíkum verkætlanum. Tað verða minst fimm ár til vit skulu taka støðu til, hvørjar íløgur skulu gerast í KT og innbúgv. So talan verður ikki um eina umsókn um eykajáttan, men um eina játtan, segði Bill Justinussen, við Rás 2 í gjár. Og hann vísti á, at hetta er vanlig mannagongd í slíkum førum, av tí at tøkniliga menningin er so skjót, at tað ber ikki til at siga longu nú, hvussu stórar upphæddir talan verður um til ta tíð.



*Frumsýningin verður í Miðlahúsinum týskvøldið kl. 20. Umframt Isak Kleist kemur annaðhvørt Josef Motzfeldt, grønlendskur landstingslimur og fyrrverandi ráðharri, ella Juliane Henningsen, folketingslimur, at siga nøkur orð um filmin í Miðlahúsinum. Eisini fer Høgni Hoydal, uttanríkisráðharri at siga nøkur orð*

*Mynd: Isak Kleist*

# Grønlandsfilmur útsettur til týskvøldið

**Av tí at Norrøna er seinkað, er sýningin av áhugaverda og vakra filminum "Við frosnu fossarnar" í Miðlahúsinum útsett til týskvøldið**

FILMUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Grønlendski journalisturin Isak Kleist, hevur framleitt filmin "Við frosnu fossarnar", sum snýr seg um lívið við Diskovíkina. Í sambandi við stóru veðurlagsráðstevnuna í komandi viku hevur hann gjørt av at koma til Føroyar at hava norðuratlantiska frumsýning av filminum. Men nú Norrøna er seinkað, verður sýningin flutt til týskvøldið.

Filmurin gevur eina mynd av lívinum við Diskovíkina, um sambandið millum náttúruna og fiskivinnuna, og hvussu viðbrekið havið er í einari náttúru, har ógjørligt er at dyrka lendið.

Ítøkiliga hevur innlandsísurin, jøklarnir og íslagið stóran týdning fyri vistskipanina og fotosyntesuna í Diskovíkini og restina av arktiska heiminum. Filmurin gevur eisini eina mynd av møguligum avleiðingunum fyri grønlendska samfelagið, vinnulívið, búskapin og fólkalívið, um vistskipanin broytist munandi vegna alheims upphitingina.

Tittulin á grønlendskum er: "Kuussuit Qerisut Sinaanni", og á enskum "By the Frossen Rivers".

Filmurin er í tveimum pørtum á 35 minuttir í part. Til sýningina í Miðlahúsinum, sum er almenn og ókeypis, verður donsk tala og undirtekstir á filminum.